Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri hjálpsemi
og sýnda samkenslu, tá okkara kæra mamma,
vermamma, omma og systur

Hanna S. Olsen

andaðist og varð jarðað.

Hjartans tøkk til tykkum øll, ið hjálptu til
við jarðarferðini og ervinum.
Tøkk fyri blómur og kransar og tykkum,
ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Eisini ein hjartans tøkk til starvsfólkið á E3
fyri góða røkt og umsorgan.

Jónvør, Sigvard, Susan og Hallur

Jógvan á Lakjuni fimmti

Mikudagin var rundur føðingardagur í Fuglafirði, tí tá fylti Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður og lærari, fimmti.

Jógvan er sonur Mariu og Jákup Oluf á Lakjuni. Hann er giftur Odvør, og eiga tey børnini herborg og Gunnar.

Jógvan tók prógv á Føroya Læraraskúla í 1977. Hann var sjómaður árini 1969-72. Hann starvaðist sum fólkaskúlalærari frá 1977 til 1989, tá hann fór at starvast á Handilsskúlanum á Kambsdali.

Umframt læraraprógvið, so hevur hann eisini ymiskskeið á Fróðskaparsetri Føroya. Hann var limur í Landsskúlaráðnum frá 1994-96, har hann eisinni eitt skifti var formaður.

Jógvan á Lakjuni varð valdur á ting í 1998. Men hann varð kendur úr politikki, áðrenn hann fekk fast sæti á tingi, tí í orð og skrivt hevur hann eisini gjørt seg kendan, bæði tá hann hevur vart tey borgarligu sjónarmiðini, men eisini á átrúnaðarliga økinum. Hann er í hvørgum føri bangin fyri at leggja fingrarnar í millum.

Jógvan var í fleiri umforum á tingi – í styttri og longri tíðarskeið frá 1989 til hann varð valdur á ting 30. apríl í 1998.

Tilboðsferðir

frá Atlantic Airways

Serlig APEX-ferð til Keypmannahavnar

2165,-
eftur og fram
íroknað ferðaavgjald

Bílegging áðrenn 2/12 2002. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi fra 2/10 til 9/12 2002.

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn). 2-11 ár minus 60%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 30 dagar.

Vikuskiftisferð Vágar - Aberdeen

1479,-
eftur og fram
íroknað ferðaavgjald

Bílegging áðrenn 2/12 2002. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi fra 28/8 til 9/12 2002.

Í mesta lagi burtur í 4 dagar. Fráferðin skal vera hósdag - heimferðin skal vera mánadag.

2 fólk ferðast saman (annað kann vara eitt barn). 2-11 ár minus 50%, børn undir 2 ár minus 90%.

Bílegging hjá Atlantic Airways
og á allum ferðaskrivstovum

ATLANTIC AIRWAYS
Flogveltur - FO-380 Selvagur
Tlf. 34 10 10 - Fax 34 10 01 - booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo

SMS søkir eftir Íbúð / húsi

í Tórshavn til leigu

til tvey vaksin og tvey børn.
Íbúðin / húsið má verða klárt at fyta inn í innan 28. feb. 2003.

Áhugaði verða vinarliga biðin um at ringja til tel. 22 13 99.

SMS

SMS • POSTBOKS 1058 • FO-110 TÓRSHAVN • TEL. 213041 • FAX. 317434

Alt málaraarbeiði verður gjørt til jólar

>>>Vit fara um alt landið<<<

Tilboð verða givin

Málarameistararnir
FALKENBERG

Tlf. 21 31 51 Tommy
Tlf. 21 31 54 Benny
Fax 31 08 38

Postboks 3158
FO-110 Tórshavn

Lýsið í bilatorginum

Skr

VINNUHÚSI
Hús og Ídnaður

Ídnaðurin

Tlf. 31 1[illegible], Fax 31 72 7[illegible], [illegible]@industry.fo